


NOREG

1 VIKA Á PERS HOTEL
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
Í SMÁTTU Í GOL Í NOREGI
16/9-04 – 28/5-05* úr 6.995,-
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Bergen og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Hartil 7 gistingar í smáttu, uttan kost.
*Í tíðarskeiðnum 30/10-04 – 12/3-05 siglir Norröna ikki til Noregs.

HETLAND

1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
2-RÚMS ÍBÚÐ Í EASTERHOULL CHALETS
16/9-04 – 28/5-05 úr 5.570,-
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 9 dagar í summarhúsi.

HETLAND-CRUISE
HÓSDAG TIL MÁNADAG
PRÍSUR VIÐ HOTELLGISTING
16/9-04 – 28/5-05 úr 1.500,-
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 2 nætur á hotelli.

DANMARK

1 VIKA Í DANLAND-ÍBÚÐ
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
Í HIRTSHALS, EBELTOFT & TRANUM KLIT
16/9-04 – 28/5-05 úr 5.895,-
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í Danland-íbúð í 1 viku.

1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
SKALLERUP KLIT FERIECENTER
16/9-04 – 28/5-05 úr 6.995,-
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku á Skallerup Klit Feriecenter.





FERÐIST 2 GJALDIÐ FYRI 1
FRAM OG AFTUR VIÐ BILI

Til Danmarkar úr 3.270,-*
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 2-koyggjukamari, innan, við wc/bað við bili.

Til Noregs úr 1.920,-*
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Bergen og aftur í 2-koyggjukamari, innan, við wc/bað við bili.

Til Hetlands úr 1.680,-*
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Lerwick og aftur í 2-koyggjukamari, innan, við wc/bað við bili.

Til Íslands úr 2.640,-
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Seyðisfjörður og aftur í 2-koyggjukamari, innan, við wc/bað við bili.

*Tilboðið er ikki galdandi hesar fráferðir: 6/1, 17/3 og 24/3

BERGEN-CRUISE
Vikuskiftisferð við bili

Fyri hvønn einans 1.360,-
**Íroknað kostnaðin:** Sigling Tórshavn-Bergen og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Hartil 2 nætur á hotelli í Bergen í dupultkamari við wc/bað.

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370
FO-110 Tórshavn · Tlf: 34 59 00
Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo



# Fimm lærlingar til Føroya Tele í Tórshavn

*"Fyri summi eydnast alt, tí at teirra leið er løgd soleiðis. Flest onnur, sum fáa tingini at eydnast, gera tað tí tey hava avgjørt, at soleiðis skal tað vera"*

Anatole France



**Søkt verður eftir fýra lærlingum í skrivstovuyrkinum, fyrisiting í Tórshavn skjótast gjørligt.**

Føroya Tele er eyðkent fyri sera fjølbroytt arbeiðsøki og harav eisini fjølbroytta starvsfólkasamanseting. Ynskið er, at ein læra á Føroya Tele skal mynda hetta, og tí vilja lærlingar okkara koma runt á ymiskar deildir í fyritøkuni. Tað er soleiðis ætlanin , at uml. helvtin av lærutíðini er í Teledeplinum í Niels Finsensgøtu, har deildirnar Kundatænasta, Avrokning og Kundaskrásting umframt Telebúðin húsast. Hesar deildir eru allar undir Marknaðardeildini.

Hin helvtin av lærutíðini verður í høvuðssætinum í Klingruni, har hesar deildir eru: Stjórnardeild, Marknaðardeild og Fíggjardeild umframt Tekniska Deild. Lærlingarnir fara í høvuðsheitum at verða knýttir at 4 deildum í eini turnusskipan – tó kann roknast við, eisini at skula á aðrar deildir í styttri tíðarbilum. Har tað er gjørligt, fara vit at seta lærutíðina saman í samráð við lærlingin.

**Søkt verður eftir einum lærlingi í goymsluyrkinum til Goymsluna í Klingruni.**

Lærlingurin verður knýttur at Goymsluni alla lærutíðina, men kann tó, fyri at víðka um heildarfatanina í mun til goymsluarbeiði á Føroya Tele, verða styttri tíðarskeið á øðrum deildum.
Arbeiðið á Goymsluni fevnir um goymslustýring, innkeyp, tolling o.a. vanligt goymsluarbeiði.

Til røttu fólkini hava vit nøkur sera spennandi læruplás.

**Til læruplássini ynskja vit fólk við:**
- HF, students- ella HH-prógvi
- førleika at seta seg inn í nýggja tøkni
- evnum at samstarva við nógvar ymiskar samstarvsbólkar
- ídni at røkka ásett mál
- goymslulærlingurin má hava koyrikort

**Lærutíðin er:**
- 2 ár og 18 vikur við students- ella HF-prógvi
- 2 ár við HH-prógvi

Lønin er sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til Starvsfólkadeildina á tlf. 30 30 30.

Umsóknir skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi týsdagin 12. oktober 2004 og skulu sendast til

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

**Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Fjarskiftisøkið mennist sera skjótt, og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja vera við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.**

FØROYATELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*




# Átak fyri háskúlan



*Lisa Schimidt, t.h., lærari á Haslev Udvidede Højskole hevur sjálvonnur júst verið í Føroyum á charmuherferð fyri at fáa fleiri næmingar á skúlan*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Gamli heiðurskrýndi Haslev Udvidede Højskole hevur somu trupulleikar sum aðrir danskir háskular. Næmingarnir fækka. Í vikuni vóru tvey fólk í Føroyum og bóðu fólk**

HÁSKÚLASKEIÐ
*Edvard Joensen*

Halsev Udvidede Højskole hevur havt nógvar føroyskar næmingar øll tey árini, skúlin hevur verið til. Og tey ætla framvegis at hava føroyingar í næmingahópinum. So føst er ætlanin, at tvey fólk frá skúlanum júst hava verið ein »charmuferð« í Føroyum til at fáa nýggjar næmingar á skúlan.

Sum tá føroysku skipararnir í gomlum døgum ferðaðust bygd úr bygd at biða fólk, komu fólk frá tí av føroyingum fyrr so kenda háskúlanum í Haslev hendanveg fyrr í vikuni at royna at fáa nýggjar næmingar til komandi skeiðið á skúlanum. Lisa Schmidt, lærari, og Martin Dam, húsavørður, vóru í ferðalagnum.

Haslev Udvidede Højskole er linjuskúli við fýra linjum. Tónleikur, kristnikunnleiki og religión, ferðaháskúli og natúr og fríluftslív, sum tey nevna linjurnar. Umframt eru nógv onnur spennandi evni á skúlanum greiða tey bæði Martin og Lisa frá.

Lisa Schmidt stendur sjálv fyri ferðaháskúlanum, sum seinnu árini hevur ferðast fast til Mongolia. Men eisini hinar linjurnar hava allar ferðir á skránni. Hvør hevur sína eftir sum gjørt verður av. Tó er ein skíðfeð til Noregs føst á hvørjum vetri.

Nógvir føroyingar seta Haslev Udvidee Højskole í samband við heimamissiónina. Tætt samband hevur eisini í farnari tíð verið millum missiónina og skúlan. Men nú er ikki so meira, greiðir Lisa Schmidt frá. Heimamissiónin er farin úr leiðslu skúlans. Hinvegin eru KFUM & K enn knýtt at skúlanum, sigur hon.

Ferðandi háskúlin, sum Lisa Schmidt stendur fyri, er eitt samstarv millum skúlan, eitt skótalið í Mongolia og KFUM skótar í Danmark.

Hon sigur, at tey hava eina fimm ára verkætlan, sum tey arbeiða við í Mongolia, har tey í felag seta ymiskt tiltøk í verk, sum kunnu menna og hjálpa teimum, ið tey samstarva við, á ymsan hátt.

Næmingarnir úr Haslev fara á eina 10 vikur langa ferð til Mongolia, har tey búgva hjá privatfólki. Tey gjalda sjálvi fyri ferðina, hóast tað er partur av háskúlaskeiðinum.

Lisa Schmidt sigur, at tað tykist, sum fólk í dag ikki reiðiliga vita, hvat ein háskúli er. Tískil er næmingatilgongdin eisini álvarsliga minkandi í mun til tað, skúlarnir hava møguleika fyri at taka inn. Og fleiri danskir háskúlar eru eisini afturlatnir seinnu árini.

Um Haslev Udvidede Højskole sigur hon, at skúlin hevur møguleika fyri at hava 120 næmingr á skeiði. Men seinasta skeið vóru tey bara 30. Ferðandi skúlin plagar tó at verða mannaður. 12 næmingar sleppa við, og tey royna at býta millum gentur og dreingir. Aldurin siga tey skal vera í hvussu er oman fyri 18 ár. Í løtuni er næsta ferðaliðið ikki mannað, sigur Lisa Schmidt. Bara átta næmingar eru teknaðir enn. Alt gentur. So brúk er fyri fýra røskum dreingjum, sum hava hug at ferðast við Transsibirisku jarnbreytini um Russland, Kina og Mongolia í eina viku ávegis til eina mongolska familju, sum teir so í einar tveir mánar skulu búgva hjá.

Hetta serliga háskúlaskeiðið kostar út móti hálvthundraðtúsund krónum. Tó er ein møguleiki at fáa nakað av ískoyti, greiðir Lisa Schmidt frá. Tað er, um tú ert KFUM skóti, sum tey hava samstarv við. Teir fáa nevniliga stuðul frá donsku skótarørsluni til júst hesar ferðirnar, sigur hon.

Meira um Haslev Udvidede Højskole fæst at vita á heimasíðuni www. huhhojskole.dk.



## Kom og gakk

GONGUDAGUR
*Tíðindaskriv*

9. oktober skipar Kunningarstovan í Havn saman við Tórshavnar Kommunu fyri einum gongudegi. Hetta er sama tiltak, sum var í juni í 2003. Tá luttóku eini 200 fólk, og sjálvt um veðrið ikki var av tí besta, vóru øll samd um at tiltakið átti endurtøku uppiborið.

Tað gera vit so nú. Fimm ymiskir gongutúrar verða á skránni. Túrarnir eru millum 2,5 og 6 kilometrar til longdar, og heiðursbræv verður latið øllum luttakarum. Allir túrar eru av Vaglinum og oman á Vaglið aftur. Tiltakið byrjar kl. 15.

## Fiskikapping við Leynarvatn

**Leygardagin verður fiskikapping hildin við Leynarvatn**

FISKIKAPPING
*Tíðindaskriv*

Tað er háárstíð hjá síla- og laksafiskarum kring landið, og sum partur av hesi verður nú skipað fyri fiskikapping. Fyri at taka lut í kappingini eru tó nakrar treytir, sum skulu lúkast. Fyrst og fremst, so er kappingin bert fyri teirra, sum hava galdandi fiskakort. Harnæst er bara loyvt at royna við flugutráðu, og at enda verður sagt, at allur reyður fiskur skal setast út aftur, nú gýtingartíð er. Kappast verður frá kl. 10 til 16. Sagt verður annars, at tilmelding til kappingina fer fram frá kl. 9.

Tá liðugt er, verður allur fiskur máldur í longd, fyri síðani at avlesa vektina á tabell. Hetta fyri at fáa rættvísi ímillum reyðan fisk, sum má setast út aftur, og tann blanka fiskin sum kann takast. Tann ið fær ein fisk, skal flyta í minsta lagi 20 metrar frá staðnum ella har pláss er. Tað er altso ikki loyvt at standa á sama plássið alla tíðina, um eitt gott mið er funnið.

Virðislønir verða handaðar við betongbrúnna, tá kappingin er av. Tað er P/F Jógvan Weihe, sum letur vinningarnar. Gávukort verða latin til teir tríggjar, sum fáa størstu fiskarnar, umframt at enn eitt gávukort verður latið til tann, sum hevur fiskað vakrasta fiskin.